Strandingar gjørdu skjótt av

Tað var eingin slingur í valsinum, tá strandingar vóru vertir fyri tjaldursmonnum mikukvøldið. Dysturin varð longu avgjørdur eftir hálvum hálvleiki, og eftir hetta var spruningurin bara um støddina á sigrinum

JÁKUP MØRK

StÍF-Tjaldur 31-22 (18-8)

Ikki var annað væntandi, enn at StÍF skuldi vinna ein tryggan sigur, tá runavíkingar mikukvøldið fóru vestur um fjørðin at avgreiða grannauppgerðina.

Alt árið hava strandingar verið við til at mynda toppin á stigatalvuni, meðan tjaldursmenn alla tíðina hevur verið at sæð í hinnum endanum.

At StÍF samstundis kundi koma ájavnt vestmenningum á stigatalvuni, um tvey stig vórðu fingin til høldar viðførdi helst eisini, at leikararnir tóku uppgávuna í nóg stórum álvara, soleiðis at mistakið hjá vestmenningunum ikki varð endurtikið.

Avgjørt beinanvegin

Tað var eisini rættuliga skjótt greitt, at StÍF veruliga ætlaði sær stigini mikukvøldið. Tjaldur var á odda 1-0 og 2-1, men eftir hetta gekk bert tann eina vegin.

Johan Danielsen tók sær av tí, sum varð sent eftir honum, meðan álopini oman móti tjaldursmálinum gingu við tí rúkandi ferð.

Tá góður helmingum var farin av fyrra hálvleiki var støðan sostatt 12-3, og strandingarnir fóru nú at taka sær eitt sindur av løttum.

Allan seinna hálvleik mundi størsti spurningurin vera, hvussu stórur munurin millum liðini bæði skuldi gerast.

Venjarin hjá StÍF, Jónleif Sólsker, nýtti eisini høvið til at geva fleiri av minni royndu leikarunum møguleikan at royna seg, og komu teir allir bara heilt væl frá uppgávuni.

Ferð komin á aftur

Størsti spurningurin eftir dystin man helst vera, um tað nú veruliga er komin ferð á aftur hjá StÍF. Liðið hevur verið í einum lítlum aldudali síðani á jólum, men sigurin á VÍF prógvaði tó, at teir ikki eru so lættir at syfta kortini.

Helst er talan um reaktión upp hørðu venjingina fyrr í heyst, tá europ-cup hondbóltur stóð á skránni.

Í øllum førum sóu áskoðararnir í fyrra hálvleiki nakað av tí hondbóltinum, sum seinasta ár gav liðnum meistaraheitið. Serliga í álopspartinum gekk skjótt fyri seg, og stórur partur av málunum fyrsta hálva tíman vórðu skotin eftir skjótálop, har mótstøðuverjan ongan møguleika hevði at skipa seg, áðrenn skotið varð.

Um formkurvan veruliga er farin at peika rætta veg, fara komandi dystirnir at vísa, men fyri fyrst fáa leikararnir eina tiltrongda hvíld í knappar tríggjar vikur, við tað at tvey frívikuskifti nú standa fyri framman.

Dysturin í tølum:
Málskjúttar:
StÍF: John Petersen 7 (2), Bent Djurhuus 5, Artur Johansen 5, Jónleif Sólsker 4 (1), Sveinbjørn Poulsen 4, Kristjan Peturson 2, Alexandur Johansen 1, Leivur Justinusen 1, Marius Joensen 1, Pauli Hansen 1
Tjaldur: Tummas Magnussen 7, Suni F. Johannesen 6, Sverri Justinussen 3 (2), Mortan Hansen 2, Dia Lamhauge 1, Ken Bærentsen 1, Arngrímur Arngrímsson 1, Arnfinn Langgaard 1
Brotskøst:
StÍF 5, Tjaldur 3
Útvísingar:
Tjaldur 1
Dómarar úr VÍF:
Alfred Hummeland og Erling Olsen

Leivur Justinusen var millum teir leikarar, sum mikukvøldið fingið eitt sindur meira av spælitíð enn vanligt
Mynd: Álvur Haraldsen

Sterkir menn kappast

Leygardagin verður kapping í styrkilyfting hildin í bilhøllini hjá Reyni Service uppi í Hoyvík

JÁKUP MØRK

Í ár hevur venjingarmiðstøðin »Frag og Fimi« 15 ár á baki, og í hesum sambandi verður skipað fyri kapping komandi leygardag.

Talan er um eina kapping innan styrkilyft, har luttakararnir skulu royna seg í greinunum, Beinbend, Bonkpress og Rættstøðulyft.

Flestu luttakararnir venja regluliga í Fragd og Fimi, men hetta merkir tó ikki, at stóru føroysku risarnir verða við í kappingini. Hetta tí tað helst hevði tikið allan spenningin burtur, um eitt nú Regin Vágadal skuldi luttikið.

Í mun til kropsvekt

Talan er um eina kapping, har allir vektflokkar dystast móti hvørjum øðrum, og tískil verða kiloini, sum einstøku luttakararnir megna at flyta, umroknað í lutfalli til kropsvektina. Sostatt verður vinnarin tann, sum megnar at lyfta flestu kiloini í mun til kropsvektina.

Tá sterku menninir venja, verður hetta aloftast gjørt í hølunum hjá Fragd og Fimi, men kappingin verður tó ikki hildin í venjingarhølunum. Ístaðin verður tað bilhøllin hjá Reyni Service, sum verður karmur um tiltakið. Seinast kappast varð í hesi ítróttargrein, á heysti 1998, fór kappingin eisini fram uppi í Hoyvíkini, og fyrireikararnir vóru væl nøgdir við umstøðurnar tað ferðina. Bæði tí bilhøllin er væl rúmligari enn venjingarhølini, men eisini tí teir á henda hátt sleppa úr vanligu venjingarumstøðunum.

Ivaleyst verður nóg mikið at tríva í, tá fleiri ungir mans fara at royna styrki sína uppi í Hoyvíkini, har kapping verður í styrkilyfting
Mynd: Jonhard Hammer

Støðan, 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	5	4	-	0	-	1	497	393	104	19
2 StÍF	5	4	-	0	-	1	498	427	71	19
3 Neistin	3	3	-	0	-	0	448	381	67	15
4 Kyndil	5	3	-	0	-	2	474	420	54	13
5 H71	5	1	-	0	-	4	406	482	-76	4
6 Tjaldur	5	0	-	0	-	5	417	526	-109	3
7 KÍF	4	1	-	0	-	3	351	462	-111	3

Dartkapping

Um vikuskiftið skipar Club 20 fyri opnari datkapping, sum samstundis er seiansta kappingin á hesum sinni

JÁKUP MØRK

Komandi sunnudag skipar Club 20 fyri dartkapping, har øll, som hava áhuga, kunnu luttaka.

Kappingin ber heitið Føroya Bjór Open, og er hetta fyrstu ferð, at Club 20 roynir seg sum vertur í slíkari kapping. Ætlanin er to, at talan skal gerast um eitt afturvendandi tiltak, sum skal verða fyriskipað á hvørjum ári.

Her heima hevur dart fyrst og fremst verið ein vetrarítróttargrein, og hetta merkir eisini, at tað nú er farið at líða heilt væl í kappingarárinum. Eftir tí, sum vit hava skilt, verður kappingin sunnudagin seinasta kappingin hetta vetrarskeiðið, so fyrireikararnir vóna, at talan kann gerast um ein hugnaligan enda á árinum.

Einmansleikur

Kappast verður bert í einmansleiki, og er ætlanin, at innleiðandi bólkar fyrst standa á skránni. Síðani fara fremstu leikararnir í einstøku bólkunum víðari til endaligu umførini, áðrenn kappingin verður avgreidd við finaludysti.

Umframt at vinningar verða latnir trimum teimum fremstu leikarunum, verða eisini latnir vinningar til leikaran við hægsta útgangi og leikaran, sum nýtir fægsta pílar í einum spæli

Todi og Óli eru tøkir aftur

Í føroysku leguni í Spania ætla teir ikki at spara upp á krútið í royndini at koppa íslendingum fyri fyrstu ferð



Todi Jónsson sæst her í dysti móti Estlandi. Hann og Óli Johannesen eru nú aftur klárir at spæla, eftir at teir noyddust at sita uttan fyri seinast. Hinvegin noyðast Jákup á Borg og Julian Johnsson at sita uttan fyri í dag

Seinnapartin í dag klokkan 13 verður seinni landsdysturin á venjingarleguni í Spania spældur. Føroyar skulu spæla ímóti Íslandi, og úr La Magna frætta vit, at føroysku spælararnir og venjarin ætla sær at leggja alt tað, teir eiga, í fyri at vinna:

– Undir venjingini tykjast menn vera sera uppsettir. Teir vita, at íslendingar hava eitt gott lið her niðri, men spælararnir, venjarin og hinir í føroysku leguni eru samdir um, at nógv skal leggjast fyri. Higartil hevur tað ikki eydnast at vunnið at fingið javnleik í a–landsdysti ímóti Íslandi, síðani altjóði limaskapurin gjørdist veruleiki í 1988. Okkara menn hava verið tætt við meiri enn eina ferð, og eg hevði ikki verið kløkkur, um meiri spurdist burturúr her niðri, enn tað hevur gjørt undanfarnu ferðirnar.

Tað er Dánjal Andreasen, nevndarlimur í Fótbóltssambandinum og kappingarstjóri í vaksnamannadeildini, sum vit hava í telefonini. Hann er ferðaleiðari á ferðini til Spania. Tá vit tosaðu við hann í gjár, vandi landsliðið. Teir skuldu venja aftur í gjárkvøldið, og í dag skulu teir so aftur í eldin.

– Bæði føroyingarnir og finnlendingarnir vóru ov linligir mánadagin. Okkara menn høvdu ov fáar royndir ímóti málinum hjá mótstøðumonnunum. At finnlendingar skoraðu var spell, tí málið var í so bíligt, sigur Dánjal Andreasen.

Todi og Óli við aftur

Mánadagin sótu tveir av stuðulsspælarunum uttanfyri. Talan var um Toda Jónsson og Óla Johannesen. Todi hevði onkran trupulleika í rygginum, sum gjørdi, at hann ikki fekk vant og spælt fyrra partin av venjingarleguni, og Óli Johannesen var plágaður av bruna í einari tá.

– Todi hevur vant við fullari ferð mikudagin og hósdagin, so tað er einki at ivast í, at hann verður við ímóti Íslandi. Eg havi eisini skilt, at Óli Johannesen verður klárur at spæla.

Vit nevndu í fyrradagin, at Todi Jónsson hevði føðingardag henda dagin. Tá teir høvdu fingið døgurða hetta kvøldið – vit frætta úr Spania, at teir búgva væl, og at maturin er góður – fekk Todi eina føðingardagsgávu:

– Vit hava hildið, at skotini hjá honum hava ikki verið nóg góð á landsliðnum ta síðstu tíðina. Tí góvu vit honum ein revolvara, og so vóna vit, at tað fer at hilnast væl hjá honum í dag, sigur Dánjal Andreasen skemtandi.

Julian skaddur

Í dystinum ímóti Finnlandi noyddist Jákup á Borg at lata seg skifta út í 2. hálvleiki. Hann var so mikið illa skaddur í fótinum, at tað bar honum ikki til at halda fram. Síðani tá hevur hann ikki luttikið í venjingini, og vit frætta, at tað verður roknað við, at Jákup á Borg ikki fer at venja tær næstu tríggjar vikurnar.

Julian Johnsson er ein av týdningarmiklu og harvið sjálvskrivaðu stríðsmonnunum á føroyska miðvøllinum. Undir venjingini fyrrapartin í gjár fekk hann ein snudd í fótin:

– Tað sá ikki væl út. Vit hava ofta sæð, at ein spælari ikki er førur fyri at seta beinið til ein dag, og at hann síðani spælir við fullari ferð dagin eftir. Eg havi einki frætt frá læknanum og fysioterapeutunum, men tað hevði ikki undrað meg, um Julian Johnsson ikki verður førur fyri at spæla ímóti Íslandi, men nú fáa vit at síggja, er tað, sum Dánjal Andreasen hevði at siga á middegi í gjár.

Hava tapt hvørja ferð

Síðani altjóða limaskapurin hjá FSF gjørdist veruleiki, hava føroyingar og íslendingar hittst fimm ferðir í altjóða skrásettum landsdystum. Higartil hava íslendingar vunnið hvørja ferð, og málmunurin er 2–8. Føroysku málini vórðu skorað í 3–2 tapinum í Gundadali 8. august í 1990. Kurt Mørkøre skoraði fyrra málið, og Jan Dam skoraði tað seinna. Teir eru báðir við í Spania.

Síðsta ferðin Føroyar og Ísland spældu var á Tórsvølli 18. august í fjør. Ta ferðina var tað ikki so lítið óruddugligt. Svenski dómarin vísti dygst undan steðginum John Petersen reyða kortið fyri hevnisøku, og Allan Mørkøre misnýtti eitt brotsspark ímóti liðfelaganum Birkiri Kristinsson. Ísland vann 1–0, og tað var þórður Guðjónsson, sum skoraði málið.

Í 1997 vóru føroyingar yviri í Höfn og spældu í sambandi við eitt hundrað ára hátíðarhaldið hjá KSÍ. Ta ferðina vann Ísland 1–0. Málið skoraðu teir fimm minuttir eftir, at vanliga leiktíðin var farin. Føroyingar og ikki minst Allan Simonsen vóru sera harmir um, at tað ikki eydnaðist at varðveita javnleikin ta ferðina.

JH

Gamal kenningur oddamaður hjá Íslandi

Nýggi venjarin hjá íslendingum var liðformaður, tá føroyingar í 1988 spældu fyrsta altjóða skrásetta landsdystin

Tá íslendingar vóru á Tórsvølli mikudagin 18. august í fjør var Guðjón Þórðarson venjari. Hann var nógv virdur í starvinum. Úrslitini vóru góð, og tað hevði við sær, at venjarin fekk lokkandi tilboð aðra staðni frá. Íslendingar eiga nógv av pengunum aftanfyri Stoke City, og fyrrverandi ílsendski landsliðsvenjarin hevur nú ábyrgdina av eingilska 2. deildar felagnum.

Nýggjur landsliðsvenjari í Íslandi er Atli Eðvaldsson, sum sjálvur hevur spælt 70 landsdystir, sum var met tá, og var liðformaður í fleiri enn tríati landdystum.

Atli Eðvaldsson, sum var hollur miðverji, var yrkisspælari í útlondunum í áttati árunum. Í Vesturtýskalandi spældi hann m. a. við Borrusia Dortmund og Fortuna Düsseldorf, og hann royndi seg eisini í Turkalandi.

Beiggi hansara er Jóhannes Eðdvaldsson, sum í sjeyti árunum var miðvallari í skotska Celtic.

Atli Eðvaldsson er ikki ókendur fyri føroyingum. Tá landsliðið 24. august í 1988 var í Akranesi og spældi fyrsta altjóða skrásetta landsdystin, var Atli Eðvaldsson liðformaður.

Nýggi íslendski landsliðsvenjarin er sonur Evald Miksson. Hesin búsettist í Íslandi eftir 2. heimsbardaga. Hann kom úr Estlandi, har hann í tríati árunum hevði verið landsliðsmálverji.

Kropssterkir

Íslendingar vunnu mikudagin 1–0 ímóti Finnlandi. Rikarður Daðason, sum spælir við Viking í Stavanger, skoraði málið í 1. hálvleiki.

Úr Spania verður sagt, at tað gekk eitt sindur harðliga fyri seg, og tískil skulu føroyingar rokna við, at tað seinnapartin í dag verða nógvir nærdystir, har kropsstyrkin fer at hava nógv at siga.

Málverjar í íslendska hópinum eru Birkir Kristinsson, ÍBV og Árni Gautur Árason, Rosenborg, og útispælararnir eru Rúnar Kristinsson, Lilleström, Rikharður Daðason, Viking Stavanger, Bjarki Gunnlaugsson, Preston, Helgi Kolviðsson, Mainz, Auðun Helgason, Viking Stavanger, Pétur Guðmundsson, Tromsö, Sverrir Sverrirsson, Fylkir, Bjarni Guðjónsson, Genk, Arnar þór Viðarsson, Lokeren, Sigurður Örn Jónsson, KR, Ólafur Örn Bjarnason, Malmö, Haukur Ingi Guðnason, Liverpool, þórhallur Hinriksson, KR, Sigþór Juliusson, KR, Indriði Sigurðsson, Lilleström og Bjarni þorsteinsson, KR.

Umframt hesar omanfyri nevndu hava fýra aðrir verið í íslendsku leguni, sum nú eru farnir aftur í útlendsku feløgini, sum teir spæla fyri. Hesir eru þórður Guðjónsson, Genk, Hermann Hreiðarsson, Wimbledon, Heiðar Helguson, Watford og Eiður Smári Guðjohnsen, Bolton.

JH

Liðformenninir í fyrsta altjóða dysti Føroya. Kristian Petersen og Atli Eðvaldsson. Nú er hin seinni vorðin landsliðsvenjari hjá Íslendingum
Mynd: Jákup Simonsen (úr bókini Fótbóltslandsliðið)